# nu



*Tað er ikki júst Norðoyastevnudámur á gongini á Klaksvíkar H.F-skeiði hesar dagarnar*



*fara undir jørð á Norðoyastevnu. - Tað er ikki so nógv annað at gera, um báðar*



*Erla Petersen syngur við í Kvinnukórinum Suð og er annars eisini virkin í Brøðrasamkomuni. Men eisini tað má bíða á Norðoyastevnu, tí próvtøkulesturin kemur í fyrstu røð*

orðna restina, flenna tær báðar.

## Stór kabala

Sigrun Skálagarð, leiðari á H.F-skeiðnum í Klaksvík, heldur ikki, at tey merkja nakað til, at næmingarnir halda tað vera órímiligt at ganga til próvtøku so tætt at Norðoyastevnuni.

– Beint, tá tey fáa at vita, nær tær ymsu próvtøkurnar eru, hoyrast sjálvandi onkur huff og puff. Men eg haldi, at tey innstilla seg skjótt uppá tað. Hin møgleikin var, at vit kanska royndu at trýsta próvtøkurnar meir saman, so tey fingu onkrar frídagar hesar dagarnar, men tað vil ongin kortini, tí so hevði verið uppaftur styttri tíð at fyrireika seg millum próvtøkurnar, sigur Sigrun.

Alt hetta er tó ikki nakað, tann einstaki skúlin hevur nakra serliga ávirkan á, sigur Sigrun. Próvtøkuætl-anin er ein stór og fløkt kabala, eisini tí nógvir av próvdómararnum koma úr Danmark. Soleiðis er tað á hvørjum ári, so tað gongur nokk eisini hesuferð. Sigr-un veit í øllum førum onki um, at Norðoyastevnan hevur havt eina keðiliga ávirkan á úrslitini til próv-tøkurnar á Klaksvíkar H.F-skeiði.

## Vegurin til kvinnuna gongur umvegis góman…

*Framhald av s. 40*

Plakatirnar av Kim Wilde og Katju K og myndin av fyrverandi gentuni skulu burtur, og vit prenta eina mynd av Móðir Theresu út av netinum og hanga hana í stovuna.

Klæðir skapa fólk, og tað er av alstórum týdningi at tú letur teg í eftir tínari persónligheit, og tá tú ikki hevur nakra ítøkiliga persónligheit, so mást tú lána eina. Klædningur við slips er ov fínt og Levi´s ov traditionelt, og um tú vilt viðganga tað ella ei, so eru Miami Vice designer-klæðini, tú keypti fyri nógvum árum síðani, og sum enn hanga í skápinum, ikki in longur. Av eini ella aðrari orsøk fella konufólk fyri listamanninum, hinum loyndarfulla og hugsanarsama; so svartir skógvar, einar svartar buksur, og svørt rullukragatroyggja er eitt sikkurt hitt.

Ílatin listarmannin mást tú eisini tosa eitt sindur um list. Skal tú tosa um t.d skaldskap, er tað gott at læra seg onkrar reglur uttanat, soleiðis at tú kanst stroya um teg við skaldsligum perlum, og tað má vera okkurt annað enn tey ódeyðiligu citatini sum vit minnast úr filmum sum t.d. "Yippie-kie-yae, motherfucker" (Bruce Willis í Die Hard)" "I'll be back." - (Arnold Schwarzenegger, í Terminator), ella "I know what you're thinking. Did he fire six shots or only five? Well, to tell you the truth, in all this excitement, I've kinda lost track myself. But being as this is a .44 Magnum, the most powerful handgun in the world, and would blow your head clean off, you've got to ask yourself one question: Do I feel lucky? Well, do ya punk?" (Clint Eastwood í Dirty Harry) Dugir "My Dick's on Fire" hjá Al Pacino ikki?

Nei, tú mást læra teg okkurt hjá Jóanes Nielsen ella Steintór Rasmussen, Kirkegaard, ella hvat við nøkrum reglum úr tí nýggjasta yrkingasavninum hjá Kim Simonsen? Skal tað vera filmur, so kundi ein nýtt hetta "All the gin joints in all the towns in all the world, and she walks into mine." Ella "here´s looking at you kid"- (Humphrey Bogart í Casablanca).

Og minst til, um tað skuldi komið so langt, far so spakuliga fram, ikki skræða klæðini av henni! Tað kann væl vera at Michael Douglas sleppur óforskammað væl frá tí í fleiri filmum. Men tað er í filmum, vit eru til í veruleikanum, og har eru tað tær fægstu, sum eru áhugaðar í, at hin nýggja skjúrtan ella blusan verður skrødd sundur.

Kama Sutra, Tantra, Svanin o.s.fr. skulu eisini gloymast í fyrsta umfari! Tað er alt, alt ov tíðliga at koma við á fyrsta ástarfundinum.

Aftaná er ikki neyðugt at tosa um tey Punisku kríggini, diskursgreining av bundnum lýsingarorðum (har tað ber til at hava eitt bundið lýsingarorð og navnorð, uttan nakað kenniorð), Nietzsche ella uttanríkispolitikkin hjá USA. Í staðin kann man bara balla seg, liggja tætt og teska banalitetir og sovna í ørmunum hvør hjá øðrum.

Og hevur hon sovið hjá tær, mást tú fyrireika morgunmat!

Fyrr høvdu tey ábit fyrst á morgni, tí eingin mátti fara fastandi av húsum. Ábit var sum oftast okkurt lítið upp í munnin, ein drýlabita og ein mjólkasopa, ein dropa av súpan ella okkurt annað frá kvøldinum fyri. Morgun-matur kundi vera drýlur og onkur viðskeri, onkuntíð bakaðu tey okkurt í drýlin, t.d. tálg ella livur. Her mugu vit sjálvandi eisini hugsa franskt, teir eru komnir nógv longri. Hevur kvøldið verið succes, hví ikki borðreiða við jarðberum og champagnu, Dom Perignon sjálvandi (Richard Gere og Julia Roberts í Pretty Woman) ella kanska grikskum morgunmati, t.d. ostapie (Tiropitakia) og frappé kaffi, og kanska luska ein einkultan ouzo í fyri at styrkja løgin og tendra í aftur stemningin, og eftirsum tað er norðoyastevna?

Hetta er alt ein meting, sigi eg við Olla, tú mást lesa løtuna og stemningin rætt av, ella kann koma gangur burturúr.

Er alt hetta ov nógv roks at gera burturúr fyri at fáa hendur á einari dámu, segði eg við Olla, so kanst tú altíð taka eina øks og høgga lítlafingur av, stappa hann í munnin, drøna út á sjúkrahúsið og fáa tey at seyma hann uppá aftur. Tá tú so liggur í hospitalssongini, kann man so royna hina klassisku Florence Nightengale effektina, tvs sjúkrasysturin sum verður forelskað í sjúklinginum og tú í henni, hon tekur náttarvaktir og krýpur upp í sjúkrasongina og vice versa, à la filmin "The english patient."

Olli segði við meg, beint áðrenn eg fór út gjøgnum dyrnar, at hann skuldi umhugsa støðuna og hvussu kvøldið við damuni skuldi verða; men hann ætlaði sær fanin í galið hvørki at verða Zorba, samureið, listamaður og so slettis ikki "The english patient" á norðoyastevnu. Tað var tað mest tápuligt, hann hevði hoyrt í longri tíð!